# Modellirnar venja av lívsins kreftum

*Mánadagin fóru ellivu ungar føroyskar dámur til New York umvegis Reykjavík. Tær skulu vera við í eini altjóða kapping, men áðrenn farið verður til USA venja tær saman við íslendsku luttakarunum, og har er eingin tíð til spæl. Genturnar venja allan dagin til seint á kvøldi*

Sveinur Tróndarson



Um nakrar dagar fara ellivu føroyskar gentur at vera við í eini vakurleika- ella modellkapping, sum verður í »The Big Apple« - New York - í USA.

Genturnar fóru úr Føroyum mánadagin og á veg til amerikanska stórbýin steðgaðu tær í nakrar dagar í Reykjavík, har tær skulu venja saman við teimum íslendsku gentunum, sum felagið Icelandic Models hevur funnið fram til.

**Glaðar fyri føroysku genturnar**

Tað var í fjør, at íslendska modellfelagið kom til Føroya at leita eftir vøkrum ungum gentum.

Grundarlagið var eftir øllum at døma til staðar, tí longu eitt ár aftaná, fara ellivu dámur at vera við í eini stórari kapping, sum kallast kallast Modelling Association of America International, Inc., har umleið 1.400 fólk vera við.

Higartil hevur tað gingið framúr væl hjá íslendingum í hesi kapping, tí teir hava vunnið hana øll árini. Tí er tað eitt mál hjá fleiri londum at vinna á júst íslendingum.

Um tað er fyri at styrkja sær um liðið, at íslendingar nú hava vent sær til Føroya skal vera ósagt, men tað vísir seg, at íslendingar eru fegnir um føroysku genturnar.

Tvær teirra príða nevniliga alla framsíðuna á bygninginum hjá Icelandic Models í Reykjavík. Lív og Gunnvá eita tær, og sum vit hava skilt, so sær tað bara heilt vakurt út.

**Venja hart og leingi**

Tað krevur sítt, at luttaka í eini slíkari kapping, og tað er ov nógv at siga, at føroyingar eru vanir við slíkt.

Hetta roynir íslendska felagið kortini at gera nakað við, tí á veg til New York hava føroysku genturnar gjørt ein styttri arbeiðssteðg í Reykjavík.

Og tá talan er um arbeiðssteðg, so verður arbeitt allan dagin á tamb.

Venjingin byrjar klokkan átta á morgni og onkran fyrrapart hevur íslendska sjónvarpið verið og tikið upp. Aftaná døgverða verður aftur farið undir venjingarnar og tá verður vant til út móti midnátt, greiðir Gissur Patursson frá úr Reykjavík.

**Foreldrini við**

Tað hevur verið tosað nógv um lívsførsluna hjá teimum ungu modellunum. Eitt nú hevur ein bretsk sending verið at sæð í SvF, sum vísti, at tær ikki altíð vera so væl viðfarnar.

Hesum byrgir íslendska fyri, tí føroysku genturnar eru ikki einsamallar á ferðini. Allar hava tær skyldfólk við sær í ferðalagnum og lítið er at ivast í, at tað er gott at hava ein góðan stuðul við sær.

Hvussu tað fer at gangast føroysku modellunum mugu vit bíða eftir at frætta nærri um, men her á Sosialinum ynskja vit teimum góða eydnu á ferðini.




## TórRek 2000 í Norðurlandahúsinum

*Framsýningin TórRek verður hildin í Norðurlandahúsinum í døgunum 26. til 29. apríl*

Sveinur Tróndarson

Í næstu viku skipað íslendska Útflutningsráðið og Eimskip fyri sølustevnuni TórRek 2000.

Tað var fyri tveimum árum síðani at fyrsta framsýningarátakið av hesum slagi fór av barkastokki.

Íslendingar og føroyingar hava gjørt avtalu um at framsýningin skal vera skiftivís í Føroyum og í Íslandi, og tá hon byrjaði í Føroyum fyri tveimum árum síðani, ja, so eiga føroyingar aftur tørn í ár.

Sjáv framsýning verður 28. apríl, men onnur tiltøk vera eisini.

Dagin áðrenn skipa vertirnir fyri 17. aldar Skálholtshátíð á Hotel Føroyum, har okkara løgmaður og íslendski ídnaðar- og viðskiftisráðharrin siga nøkur orð.

Fríggjadagurin verður skipaður soleiðis, at fyrilestrar verða hildnir fyrrapartin. Tá fara m. a. Vígdis Finnbogadóttir og Finnbogi Arge at hava orðið.

TórRek verður hesaferð eitt sindur øðrvísi enn tann fyrsta av slagnum.

Íslendingar hava nevniliga boðið grønlendingum at vera við, og nakrir grønlendingar hava tikið av.

Endamálið við sølustevnuni er at menna samhandilin millum Ísland, Grønland og Føroyar og at styrkja samstarvið millum londini.

# Scillygullið skal til Føroya

*Manningin á Eyturoyingi, sum samam við manningini á Jarnbardi skal til Scillyoyggjarnar at umboða føroysku litirnar, er ikki í iva um, at í ár skal gullið til Føroya. Teir hava vant síðani januar mánað og halda seg hava møguleika fyri betri úrsliti enn seinast tá teir gjørdust nummar átta av 60 giggum*

Sveinur Tróndarson

Um knappa viku fer »árliga« ferðalagið úr Føroyum til Scillyoyggjarnar. Tað er størri enn tað hevur verið undanfarin ár, tí í ár fer, umframt manningina á Eysturoyingi eisini »kvinnumanningin« á Jarnbardi at rógva har niðri.

Fyrrakvøldið vóru vit framvið og fingu eitt prát við eysturoyingarnar um vónirnar hesaferð. Í fjør gjørdust teir nummar átta, men tað skal betrast siga teir.

– Vit eiga at leggja allar kreftir í at gerast millum 12 teir fremstu bátarnar í fyrsta róðrinum, tí so koma vit í A-bólkin beinanvegin. Tað er lættari at halda sær har, enn at skula rógva seg upp, sigur ein av manningini.

Skipanin er tann, at allir bátarnir - einir 60 í tali - rógva fyrsta róðurin og eftir úrslitinum verða teir so býttir í bólkar á tólv. Skulu eysturoyingarnir gera sær vónir um at vinna A-bólkin, sum er tann besti, so skulu teir ikki enda aftanfyri nummar 36 í fyrsta róðrinum. Tá hava teir møguleika at rógva seg upp.

Men tað er ikki málið. Málið er at endað frammanfyri nummar 12 í fyrsta róðrinum og so halda seg í A-bólkinum alla tíðina. Og tá teir sjálvir skulu meta um tað, so eru møguleikarnir avgjørt til staðar.

– Vit eru betur fyri í ár enn vit vóru í fjør, siga teir sum í ein munn, og hartil skal so havast í hugað, at nú hava teir vant við tí róðrarteknikki, sum teir í fjør lærdu á Scillyoyggjunum.

Tann mátin, siga teir, gevur giggini, nógv størri ferð og tað merkist væl.

– Ti halda vit, at vit hava ein betri møguleika at gera okkum galdandi eitt sindur longri frammi í oddinum, siga teir.

Men kappingin er hørð. Manningin, sum vann seinast - tann úr Cornwall - hevur vunnið allar róðrarnar teir hava luttikið í á Scillyoyggjunum, men tað tekur kortini ikki mótið frá eysturoyingunum.

– Teir hava tapt onkran annan róður, so tað ber til at vinna á teimum.

Ein annar trupulleiki føroyingarnir hava tá teir koma til Scillyoyggjarnar. Tað er báturin. Brendan, sum teir venja í her heima er nógv tygnri enn tann báturin teir kappast í har niðri, so tað skal eitt sindur av umstilling til, áðrenn teir fáa fult gagn av bátinum.

Tað er einki yvir at dylja, at eysturoyingarnir hava eina harða uppgávu fyri framman, tí áttindaplássið í fjør var eitt framúr gott úrslit. Kortini eru teir ikki bangnir fyri at seta sær høg mál, og skulu vit trúgva teimum, so er rætti taktikkurin at leggja alt í fyri at fáa ein góðan start.

– Lat okkum nú fáa at síggja, siga teir áðrenn teir flota bátin ...




*– Hesaferð skal tað vera, sigur manningin á Eysturoyingini undan fráferðini til Scillyoyggjarnar. Áttindaplássið frá í fjør skal betrast*



Sosialurin

# 2000 Fótbóltur



**Alt um liðini í 1. deild**

**Leikarayvirlit**

**Samrøður við leikarar, venjarar og formenn**

**Landsliðsárið 2000**

**Alsamt fleiri leikarar uttanlands**

**Er kappingin nóg væl skipað?**

**Tórsvøllur ella Svangaskarð**

**Serblað 56 síður kostnaður 40 kr.**